Belgia

Beveren—St. Liege 4-1
Antwerp—Waregem 3-1
FC Liege—Winterslag 1-1
Cercle Br.—Lierse 1-1
Anderlecht—FC Brügge 5-2
Seraing—Tongres 3-0
Waterschei—Beerschot 1-0
Courtrai—Lokeren 0-3
Gent—Rac White 2-0

Holland

Willem II—Utrecht 1-2
Alkmaar—Feyenoord 0-1
Roda—Helmond 3-1
Zwolle—Sittard 1-0
Twente—Go Ahead 1-1
Nijmegen—Ajax 0-4
PSV Eindh.—Haarlem 2-1
Sparta—Breda 4-0
Excelsior—Groningen 3-0

Italia

Ascoli—Inter 0-0
Cagliari—Fiorentina 0-0
Cesena—Sampdoria 0-2
Genus—Catanzaro 4-1
Juventus—Avellino 4-1
Napoli—Torino 1-0
Verona—Udinese 0-0
Pisa—Roma 1-2

Seinasta vikuskifti var 23. umfar í italiensku kappingini leikt. Støðan í ovara enda er nú, at Roma liggur á odda við 33 stigum. Juventus liggur nr. 2 við 30 stigum og Verona nr. 3 við 28.

Á fyrsta sinni í Grønlandi

Í grønlendsku tíðindunum í Danmarks Radio mikudagin vistu teir at siga, at 1. juli í ár verður á fyrsta sinni leiktur landsdystur í fótbólti í Grønlandi.

Hendan dagin skal grønlendska landsliðið leika móti føroyska A-landsliðnum. Dysturin verður leiktur í Nuuk.

Ætlanin var annars, at eisini íslendska landsliðið skuldi leika í grønlandi um hetta mundi, men av ymiskum orsøkum verður tað helst av ongum, vistu teir at siga úr Grønlandi mikudagin.

Súkklufelag stovnað

Tórshavnar Súkklufelag, stuttstavað TSF, varð stovnað seinasta týskvøld.

Rættuliga nógv ungfólk og eldri vóru møtt til stovnandi aðalfundin, ið varð hildin í fundarhølunum í ÍSF-húsunum týskvøldið.

Á fundinum var fyrst lógaruppskotið frá fyrireikingarnevndini viðgjørt, og var tað samtykt við nøkrum fáum smávegis broytingum.

Síðani var nevnd vald við tiltakslimum og grannskoðarum.

Í nevndina vóru vald Erland Ludvig, John E. Christiansen, Magnus Jørgensen, Unn Jacobsen og Pól Vestergaard.

Sum tiltakslimir vóru valdir Pól Henrik Poulsen og Terji Kollskerð, meðan Áki Hansen og Mourits Mouritsen vórðu valdir til grannskoðarar.

Eisini varð limagjaldið ásett á stovnandi fundinum. Uppskotið frá fyrireikingarnevndini varð einmælt samtykt. Tað ljóðaði upp á 100 kr. til tey, ið eru yvir 16 ár, meðan tey yngri enn 16 ár gjalda 50 kr.

At enda upplýsti John E. Christiansen, sum var ein av fyrireikarunum til fundin, at ætlanin er at skipa fyri tí fyrsta tiltakinum Dýra Biðudag, sum er seinast í apríl.

Rættuliga nógv nýttu høvi at seta navn sítt á tekningarlistan, ið lá frammi á fundinum. Hesi, ið teknaðu seg á fundinum, nýtast tó ikki at gerast limir. Fyrireikingarnevndin greiddi frá, at tá nevdin hevur lagt ætlaninar fyri hvat, ið komandi tiltøkini vera, sendir hon bræv út til tey, ið skrivaðu seg upp. Hesi fáa so eitt giro-kort við brævinum, og um so er, at tey framvegis eru áhugaði fyri at gerast limir, kunnu tey gjalda limagjaldið. Men hava tey ikki áhuga tá, kunnu tey bert gloyma tað, varð upplýst á fundinum.

Annars kann upplýsast, at um tað eru nøkur, ið av einari ella aðrari orsøk ikki vóru á fundinum, kunnu tey tekna seg hjá nevndini, og fáa tey so eisini bræv frá nevndini, tá hon sendir upplýsingarnar um komandi ætlaninar út.

Nevndin í nýggja súkklufelagnum

§ 1

Navn felagsins er Tórshavnar Súkklu Felag, stuttstavað TSF. Endamál felagsins er: At skipa fyri motións- og súkklukappingum av ymiskum slag.

§ 2

Ein og hvor, sum góðtekur felagslógina og sum vil gjalda tey gjold, sum eru ásett og góðtikin á aðalfundinum, kann gerast limur í felagnum. Lógin verður útflýggjað við innliman.

§ 3

Um limur ikki heldur skyldur sínar í felagnum, kann starvsnevndin taka avgerð um útliman.

§ 4

Tórshavnar Súkklu Felag verður stýrt av: a/ aðalfundinum, b/ starvsnevndini.

§ 5

Aðalfundurin.

Aðalfundurin hevur hægsta vald í málum TSF's. Aðalfundurin verður hildin í mars við hesi dagsskrá.

1. *Formaðurin greiðir frá farna ári.*
2. *Kassameistarin leggur fram grannskoðaðan roknskap.*
3. *Innkomin mál.*
4. *Val av starvsnevnd og varalimum smb. § 8.*
5. *Ymiskt.*

§ 6

Aðalfundurin verður lýstur við ein mánaðar freist. Roknskaparárið er 15. februar—15. februar. Uppskot um lógarbroytingar og mál viðvikjandi skipan av felagnum, sum verða kravd viðgjord á aðalfundinum, skulu vera starvsnevndini í hendi 3 vikur fyri aðalfundin.

Fundarskrá og frágreiðing frá formanninum, roknskapur og uppskot um lógarbroytingar verða send ollum limum 10 dagar fyri aðalfundin.

§ 7

Fyri at uppskot skal verða samtykt á aðalfundinum krevst, at meir enn helmingurin av teimum mottu atkvoða fyri.

Standa atkvoður á jovnum, er tað atkvoða formansins, ið fær avgerðina.

§ 8

Starvsnevndin

Í starvsnevndini sita 5 limir, ið skipa seg við formanni, kassameistara, skrivara og næstformanni. Teir verða valdir á aðalfundi fyri eitt tvey ára skeið, tveir ólika ár, tríggir lika ár. Valdir verða eisini 2 tiltakslimir fyri eitt tvey ára skeið.

Starvsnevndin umsitur:

a) samtyktir aðalfundanna
b) raksturin av TSF
c) góðkenning av ítróttarútgerð, ið skulu nýtast í kappingum.

A aðalfundinum verða eisini valdar undirnevndir at skipa fyri hvorjari sergrein sær innan ítróttin, hesar sita eitt ár í senn.

§ 9

Til grannskoðan av roknskapi velur aðalf. tveir grannskoðarar.

§ 10

Eykaaðalfundur kann verða hildin tá ein tríðingur av limunum krevja tað. Hann má verða fráboðaður minst 14 dagar áðrenn.

§ 11

Verður felagið avtikið skulu ognir tess falla til ÍSF.

Vága Javnaðarfelag

Fundur verður í skúlanum á Giljanesi týskvøldið 22.3. kl. 19,30. Atli Dam og Vilhelm Johannesen leggja fyri.

Aftaná verður kaffi og burturluting.

Øll javnaðarhugað vælkomin.

Nevndin

Landsliðið — Saga

Í gjárkvøldið var fyrsti dysturin millum danska 1. deildarliðið Saga og føroyska hondbóltslandsliðið leiktur, men blaðið var farið til prentingar áðrenn dystin, so vit kundu sjálvsagt ikki fáa úrslitið við her.

Saga stendur fyri Samvirkets Atletik- og Gymnastik-forening, og kemur frá Frederiksberg í Keypmannahavn.

Felagið hevur leikt í 1. deild í 9 ár, men hevur í løtuni trupulleikar við at vera verandi í 1. deild. Tó verður mett, at so nógvir góðir leikarar eru, at felagið aftur verður í ovara enda á 1. deild um ikki so nógv ár.

Leikararnir, ið koma til Føroya, eru hesir:

Torben Monberg: 20 ár — 5 unglingalandsdystir.

Frak Berger: 31 ár — hevur verið á 1. liði síðani 1970.

Henrik Hansen: 26 ár — 20 U-landsdystir.

Michael Jensen: 25 ár — 3 A- og 15 U-landsdystir.

Erik Sundal: 29 ár — 5 U-landsdystir.

Michael Henrichsen: 19 ár — 10 U- og 8 Y-landsdystir.

Peter Madsen: 22 ár — nýggjasti leikari á liðinum. Er júst komin frá Køge.

Lars Patzyj: 20 ár — 12 U-landsdystir.

Hans Sørensen: 26 ár — »holdets humørspiller« kalla danir hann.

Christian Christiansen: 22 ár — maðurin við stórstu persónligu framgongdini í ár.

Jørgen Mortensen: 22 ár — nýggjur leikari úr Jútlandi.

Liðið leikti sum sagt í gjárkvøldið móti føroyska landsliðinum í Havn. Í dag verður leikt í Klaksvík, og í morgin verður seinasti dysturin í ítróttarhøllini á Giljanesi.